# Belgiskur retrobilur á veg



**Í ár eru 50 ár liðin síðan belgiska bilverksmiðjan sum gjørdi Imperia bilarnar, læt aftur. Imperia vórðu framleiddir frá 1906 til 1948. Eftir ætlan kemur ein nýggjur Imperia á marknaðin seinni í ár**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein bólkur av belgiskum íleggjarum og verkfrøingum arbeiða í løtuni við at gera klárt til framleiðslu av einum retro-hybridbili við belgiska bilmerkinum Imperia sum fyrimynd.

Imperia bilar vórðu gjørdir í Belgia frá 1906 til 1948.

Endamálið við hesum nýggja Imperia er at gera ein retrobil við framkomnari hybrid tøkni. Talan verður um ein kvikan umhvørvisvinarligan sportbil, sum eftir ætlanin skal koma á marknaðin seinni í ár.

*Imperia verður ein retrobilur við framkomnari hybrid tøkni*




*Nýggi bilurin verður gjørdur gamla Imperia sum fyrimynd*

# Koyring uttanlands




*Kelda: FDM*

Hetta er tíðin tá nógv fara av landinum at ferðast við bili. Viðvíkjandi koyring uttanlands er nógv at taka atlit til, og lógirnar eru ymiskar í teimum ymisku londunum í Evropa.

Í fleiri londum í Evropa er promillumarkið 0,5, men t. d. í Norra og Svøríki er markið 0,2 og í fleiri londum í fyrrverandi Eysturevropa er promillumarkið 0.

Bøturnar fyri at tosa í fartelefon undir koyring kunnu kosta helt upp til 1300 krónur, sum t.d. í Norra. Ferðmarkið er eisini sera ymiskt í teimum ymisku londunum og bøturnar fyri at koyra ov skjótt eru stórar í nógvum londum og nógvstaðni eru automatiskar ferðkanningar. At hava tey røttu dekkini undir bilinum er av sera stórum týdningi.

Í seinasta limablaðnum hjá FDM, Motor, eru fleiri góð ráð til bilførarar, sum fara uttanlands at koyra. Her eru yvirlit yvir hvussu stórar bøturnar eru fyri at tosa í fartelefon undir koyring og um ferðmarkið í teimum ymisku londunum í Evropa.




## Fótbóltur steðgar BMW-framleiðsluni

**Øll framleiðsla av BMW bilum í Týsklandi steðgar í dag, tá Turkaland og Týskland møtast í semifinaluni í EM-fótbólti.**

**BMW-leiðslan syrgir fyri at steðga framleiðsluni nóg tíðliga til at øll, sum arbeiða í konsernini, kunnu klára heim og sita við sjónvarpsskíggjan, áðrenn dysturin byrjar.**

**Leiðslan ásannar, at tað hevði verið vónleyst at fingið starvsfólkini at arbeitt meðan dysturin er og beint eftir "internu" uppgerðina millum Týskland og Turkaland.**

**Nógvir turkar arbeiða hjá BMW. Bara á verksmiðjuni í München arbeiða 1.700 turkar við týskum ríkisborgararætti.**

**Týska sjónvarpsstøðin ZDF roknar við, at 30 milliónir fólk fara at stilla inn á teirra kanal, meðan dysturin er.**

